Spurningar og  svar: 14.01.26

**Spurningur:** Hevur tú møguleika at senda datablað uppá teir handskar sum tit vísa til frá Abena og Klinion?

**Svar:** Databløð eru nú millum viðheftu skjølini á Keypsportalinum.

**Spurningur:** Í krøvunum til latexhandskar verður nevnt, at teir skulu hava mótstøðuføri móti cytostatiskum evnum.

Veitarar hava víst á, at latexhandskar sambært galdandi fakligum tilmælum vanliga ikki verða mæltir til nýtslu saman við cytostatiskum evnum, tí náttúrligt gummi kann verða skjótt niðurbrotið av slíkum evnum.

Kunnu tit vátta, um hetta kravið er ætlað at galda fyri latexhandskar, ella um talan er um eina møguliga skeiva orðing í krøvunum?

**Svar:** Talan er um eina skeiva orðing. Latexhandskarnir nýast ikki vera mótstøðuførir móti cytostatiskum evnum.